## DAGSINS MEINING

# Suðuroyarætlanin 2

Sum vit nevndu í gjár, so hevur Suðuroyarætlanin bæði sterkar og veikar síður. Vit loyva okkum tó at halda, at hon hevru fleiri sterkar enn eikar síður. Her eru avgjørt ting, ið eru verd at byggja á, men her eru eisini veikt orða punkt, sum avhjørt eiga at verða strammað upp.

Til tey sterku punktini hoyrir orðingin um flakavinnuna og um fiskapakkan. Her verður ásannað, at verandi støða innan flakavinnuna í Suðuroynni als ikki er nøktandi, og víst verður á møguleikan fyri, at Suðuroyggin verður ein feskfiskamiðdepil, sum hon var í fyrru helvt av 90'árunum, tá beinleiðis samband var millum Suðuroynna og Skotland. Ein fortreyt fyri hesum er, at skip, fólk staðnum og aðrir íleggjarnar fáa møguleika at fara undir slíkt virksemi. Ássanað verður, at tað er ein bati, at Fiskavirking nú fer undir fiskaframleiðslu á Polarfrost í Vági í mars mánaði, har brúk verður fyri 35-40 ársverkum. Men síðan verður restin líkasum latin yvir til fiskapakkan, ið skal tryggja, at føroysk fiskavirki fáa veruligan møguleika at bjóða uppá botnfiskin, sum føroysk fiskifør veiða í føroyskum og í íslendskum sjógvi. Hetta økið verður skipað við lóg. Hetta er ivaleyst ein gongd leið, men tað hastar við lóggávuni, og má hon fremjast her í vár, um hon skal hjálpa Suðuroynni. Men her má meira til, eitt nú ein tíðaravmakraður íverksetarastuðul til og einhvør skipam, ið kann tryggja, at allir djúpvatnstrolararnir í oynni landa veiðuna í oynni.

Eitt hitt mest áhugaverda í ætlanini er spurningurin um fluttingin. Landsstýrið ásannar, at Suðuroyggin er sera fjarskotin, bæði tá tað snýr seg um flutningssambandið innanoyggja og við umheimin. Hetta ger, at virkir í oynni eru verri fyri enn virkir aðrastaðni í landinum, serliga tá talan er um útflutning av fiskum fiskaúrdráttum. Staðfest verður, at ein fráferð úr Suðuroynni til skotska meginlandið hvørt fríggjakvøld hevði ivaleyst styrkt um vinnugrundarlagið á staðnum. Síðan verður boðað frá, at landsstýrið fer at kanna, hvussu flutningsmøguleikarnir innlendis og til meginlandið kunnu betrast og virka fyri, at Suðuroyggin verður javnstillað við restina av landinum. Hetta verður gjørt í samstarvi við flutningsfeløgini. Hetta er ov veikt orðað. Tað, sum vinnan í oynni mest av øllum hevur brúk fyri, er ítøkiliga at fáa at vita, nær beinleiðis samband fæst tiol meginlandið og nær vinnan í Suðuroy verður javnstillað við vinnuna í restini av landinum, hvat flutningskostnaðu viðvíkur. Tað bøtir ikki, at samferðslumálaráðharrin eftirfylgjandi fer út og boðar frá, at nýggi Smyril ikki fer at sigla til Skotlands! Her hongur ikki saman og løgmaður má samskipa hesa atgerðarætlan betur og ansa eftir, at allar góðar kreftir hála í somu hamlu. Tað hevur longu verið sagt, at Suðuroyarætlanin er meira ein visión enn ein ætlan. Tað er nakað um tað. Visiónir eru neyðugar fyri at langsiktað mál kunnu røkkast. Vit venda aftur til hetta evnið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dupultumboðan er hálv umboðan

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*




Í orðaskiftinum um fólkatingsumboðan Føroya hava ymisk sjónarmið verið frammi. Eitt sera áhugavert sjónarmið, sum m.a. Kári á Rógvu, stjórnmálafrøðingur hevur ført fram er, at Føroyar høvdu fingið nógv størri nyttu av fólkatingsumboðunum, um tey vóru í Fólkatinginum burturav og ikki, sum nú, bæði í Løgtinginum og í Fólkatinginum. Hann heldur, at hetta at okkara fólkatingsumboð í nógv ár hava røkt Løgtingssessin fram um Fólkatingssessin, hevur gjørt, at nógvir týdningarmiklir menningarmøguleikar eru farnir fyri skeytið.

Føroya Løgting er evsta vald í Føroyum, og arbeiðið í Løgtinginum krevur eitt fólk fult og heilt. Men fólkatingssessurin krevur eisini eitt fólk fult og heilt, um hann verður tikin í álvara. Tí er henda dupultumboðanin skeiv. Soleiðis hugsa tey eisini aðra staðni. Í Danmark loyva flokkarnir t.d. ikki, at sami persónur umboðar flokkin í bæði fólkatinginum og í EU-parlamentinum. Um ein fólkatingslimur verður valdur í EU-parlamentið, leggur hann fólkatingssessin frá sær, soleiðis at hon ella hann kann leggja alla sína orku í EU-politikkin. Millum annað hevur tann í Føroyum gitni Poul Nyrup Rasmussen sagt fólkatingssessin frá sær, nú hann varð valdur í EU-parlamentið, og tað gjørdu eisini øll hini fólkatingsumboðini, sum vóru vald í EU-parlamentið.

Eg ivist ikki í, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri Føroyar, um so er, at okkara fólkatingsumboð vóru fólkatingsumboð burturav.

Um nøkur meining skal vera í hjá føroyingum at hava umboð í Fólkatinginum, so eigur minsta kravið at vera, at føroyskt vinnulív, føroyskt mentunarlív, útbúgvingarskipan okkara, granskingin og ikki minst politiska skipan okkara fær nógv størri nyttu av hesari uttanlandsumboðan føroyinga enn í dag. Dupultumboðan er bert hálv umboðan.

# Ríkisborgararætturin er eitt gylt atgongumerki

**Edmund Joensen**




Føroyar hava bestu møguleikar í verandi ríkisfelagsskapi, har allir møguleikar, sum ríkið bjóðar, standa føroyingum í boði. Serliga tey ungu eru í sterkari støðu.

Felags ríkisborgararætturin er eitt gylt atgongumerki hjá øllum føroyingum, men kanska serliga hjá teimum ungu, ið vilja útbúgva seg á hægri lærustovnum í Danmark ella aðrastaðni í Evropasamveldinum.

Okkara ungu, sum vit áhaldandi skulu eggja til at fara út í stóru verð at søkja sær vitan fyri síðan at koma aftur at byggja land, hava bestu møguleikar við ES passinum í hondini. Hesar møguleikar mugu tey ikki missa.

Hugsið um, at fleiri politiskir flokkar í Føroyum ætla at lata av hondum felags ríkisborgararættin. Flokkar sum nú aftur bjóða seg fram at umboða tykkum á fólkatingi næstu 4 árini.

Hugsið eisini um, at liberali sambandspolitikkurin er í tráð við nútímans støðuna her í framkomna partinum av heiminum. Fólk vilja hava frælsi at velja frítt. Fólk vilja hava veruligt fólkaræði.

Sambandsflokkurin er hornasteinurin í føroyskum politikki. Flokkurin stendur fyri einum politikki sum ger tað møguligt at vera partur av einum størri ríki í heimssamfelagnum og samstundis stýra egnum landi. Tað er ein sterk støða fyri okkum føroyingar.

Uttan ein sterkan Sambandsflokk er eingin trygd fyri, at hesir møguleikar vera varðveittir Føroya fólki. Minnist til tað á valdegnum 8 februar.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.